FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið.

Tórshavn, tann 09. januar 2017
Fmr J.Nr.: 16/00414

Viðgjørt:

**Løgtingsmál nr. xx/2016: Uppskot til løgtingslóg um Talgildu Føroyar**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**at keypa tænastuveitingar og tøkni til verkætlanina Talgildu Føroyar**

**§ 1.** Landsstýrismanninum í fíggjarmálum verður heimilað at halda útreiðslur at fremja verkætlanina Talgildu Føroyar.
*Stk. 2.* Útreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 150 mió. kr.
*Stk. 3.* Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur við privatar og almennar fyritøkur og grunnar um at bera ein part av útreiðslunum smb. stk. 2.
*Stk. 4.* Kommunurnar rinda 25,5 mió. kr. av útreiðslunum smb. stk. 2. Býtið av útreiðslunum millum einstøku kommunurnar verður grundað á fólkatalið í kommununum 1. februar 2016.
*Stk. 5.* Kommunanna partur smb. stk. 4 kann verða eftirhildin í kommunuavrokningini yvir 3 ár í eins stórum upphæddum. Fyrstu ferð í mars 2018.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2023.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

**Orsøkin til lógaruppskotið**
Samgongan hevur sett sær fyri, at Føroyar skulu gerast undangonguland innan talgilding.

Lógin um Talgildu Føroyar er eitt avgerandi fet móti málinum. Lógin verður grundarlagið undir talgilda undirstøðukervinum fyri alt tað føroyska samfelagið, og fer soleiðis eisini at stuðla undir málinum um varandi fólkavøkstur í Føroyum.

Við talgildingini fær borgarin:

- Amboð, ið kunnu gera dagligdagin lættari, tryggari og spara tíð.

- Eitt talgilt persónligt samleikaprógv
(kann eitt nú nýtast til at undirskriva løgfrøðiliga bindandi avtalur)

- Eitt persónligt login (innritan) til allar skipanir hjá øllum tí almenna geiranum og fleiri størri fyritøkum
(í staðin fyri, at hava fleiri ymisk login til eitt nú TAKS, SEV, netbankan v.m.)

- Atgongd til almennar og flestar privatar tænastur á netinum savnaðar í einum persónligum portali

- Størri sjálvræði yvir upplýsingum um seg sjálvan í ymsum skipanum. Borgarin fær yvirlit yvir allar dátur, ið eru skrásettar um borgaran sjálvan, og atgongd til at dagføra upplýsingar á einum og sama staði.

- Størri trygd í dátasamskiftinum millum myndugleikar, fyritøkur og borgarar.

Við talgildingini fær vinnulívið:

- Amboð, ið kunnu styrkja kappingarførið, geva nýggjar møguleikar og skapa størri framleidni (øktan produktivitet)

- Eitt talgilt samleikaprógv
(kann eitt nú nýtast til at undirskriva løgfrøðiliga bindandi avtalur)

- Eitt virkislogin (innritan) til allar skipanir hjá øllum tí almenna geiranum og fleiri størri fyritøkum.

- Ókeypis atgongd til grundardátur
(Eitt nú um bústað, kort data o.s.fr.)

- Møguleika at nýta unikar lyklar til at eyðmerkja persónar og virki

- Atgongd til almennar og flestar privatar tænastur á netinum savnaðar í einum og sama portali

- Møguleika at veita talgildar tænastur til borgaran og onnur virki umvegis ein felags portal

Við talgildingini fáa kommunur, land og samfelagið sum heild:

- Møguleikan fyri sjálvsavgreiðslu av øllum almennum tænastum

- Møguleikan fyri nýggjum og betri talgildum tænastum til borgarar kring alt landið.

- Møguleika at veita tænastur til fólk við serligum avbjóðingum – eitt nú sjón- og hoyriveik – í størri mun enn í dag.

- Ókeypis atgongd til grundardátur (eitt nú hjá tinglýsing og persónsyvirliti)

- Lættari yvirlit yvir allar almennar dátugrunnar
- Trygt samskifti millum dátuatagrunnar
- Betri framleidni í almenna og privata geiranum geiranum
- Størri búskaparvøkstur

Talgildu Føroyar verkætlanin flytir Føroyar framá við risafetum, og verkætlanin verður ein hornasteinur í menningini av okkara landi komandi árini. Talgilda frambrotið fer at gera gerandisdagin lættari hjá vanliga føroyinginum, hjá almennu fyrisitingini og hjá føroysku vinnuni. Vit fara øll at flyta okkum í eina tíð, har talgilda samskiftið verður snúningsásin.

Fyrimunirnir eru sjónligir. Loksins fara borgarar og fyritøkur at samskifta talgilt við almenna geiran. Fyrisitingarligar tænastur hjá tí almenna verða tøkar á netinum, og veitingar og mannagongdir í almennu fyrisitingini verða eisini talgildar. Hesi stig fara at lætta munandi um gerandisdagin.

Talgilda frambrotið letur eisini upp fyri styrktum kappingarføri, vøkstri og øktari framleiðsluorku og fleiri størvum. Talgildingin tryggjar nýggjar møguleikar, nýggjar tænastur og ein skynsamari rakstur bæði hjá vinnulívi og almenna geiranum. Talgilda frambrotið verður eisini snúningsási, tá ið stig verða tikin at nútímansgera vælferðina og tænasturnar hjá føroyingum komandi árini.

Talgildu Føroyar verða eisini karmur um okkara egnu talgildu undirskrift. Talgilda undirskriftin hevur verið ætlað í nógv ár. Ein høvuðsavbjóðing seinastu árini hevur verið, at eingin yvirskipað samskipan hevur verið á økinum, tí fyritøkur og stovnar hava hvør í sínum lagi ment ymiskar talgildar skipanir. Við Talgildu Føroyar verkætlanini verða ymisku træðrirnir savnaðir saman. Hetta tryggjar og savnar samskifti ímillum allar spjaddar datagrunnar í Føroyum. Verkætlanin er í orðins sanna týdningi ein heildarætlan, har høvuðsdenturin er heildin og fjølbroyttur møguleikarnir at endurnýta verandi skipanir og skráir.

Heildarætlanin fyri Talgildu Føroyar (skjal 1) verður grundarlag undir arbeiðinum at talgilda Føroyar í árunum 2016-2020.

**Nyttan av Talgildu Føroyum**

So hvørt sum talgildu loysnirnar verða settar í verk, økist samfelagsligi ágóðin. Tað fer at gerast alsamt lættari og minni tíðarkrevjandi hjá borgarum at avgreiða síni viðurskifti við tað almenna, og tað fer eisini at gera tað munandi lættari hjá fyritøkum og stovnum at tæna kundunum. Tú fert at kunna avgreiða tíni viðurskifti alt samdøgrið og uttan mun til, hvar tú ert í heiminum, uttanlands sum á fjarleiðum.

Verkætlanin Talgildu Føroyar fer at skapa betri fyritreytir fyri nýggjum sjálvavgreiðslum og betri fyritreytir fyri at nýta verandi sjálvavgreiðslur. Hetta kemur at leysgeva orku hjá bæði landi, kommunum og privatum fyritøkum. Meira av sjálvavgreiðslum merkja eisini, at borgarar í størri mun enn í dag kunnu avgreiða teirra viðurskifti við landsmyndugleikar, kommunur og privatar fyritøkur.

Málið er, at nógv av tí tilfeingi, sum í dag fer til umsiting, skráseting og eftirkanning, verður leysgivið, soleiðis at stovnar og fyritøkur fáa hugsavnað seg um sínar kjarnutænastur og harvið fáa veitt kundunum eina betri tænastu. Eitt úrslit av verkætlanini verður ein effektivari og smidligari almennur geiri, sum sannlíkt verður bíligari at reka. Tað merkir, at játtaði peningurin til ymisku vælferðarøkini verður skynsamari brúktur. Eisini fær vinnulívið møguleika fyri, at bjóða nýggjar tænastur og at reka virksemið meira rationelt.

Atgongd hjá privatum fyritøkum, kommunum og stovnum til grundskráir sum fólkayvirlit, virkisskrá og tinglesing verður munandi lættari og bíligari. Møguleiki verður fyri at brúka ein unikan lykil at samskifta við.

Fyri einstaka borgaran fær tað stóran týdning, at hann frameftir fær **ein** samleika og **eitt** logg- in, ið hann kann nýta til allar skipanir. Í dag er neyðugt at halda skil á einari langari røð av loyniorðum.

Í dag noyðast borgarar at geva somu upplýsingar til fleiri ymiskar almennar myndugleikar. Frameftir skulu somu upplýsingar bert gevast einaferð. Hetta fer at merkja, at upplýsingarnar verða rættari og tryggari.

Einstaki borgarin fær eisini møguleika at síggja hvørjir persónar, hava verið inni og hugt eftirsínum dátum.

Ein vælskipað talgilding fer eisini at skapa møguleikar fyri øðrum vinnum og øðrum tænastum, sum vit í dag ikki kunnu ímynda okkum.

Ein munadygg talgilding fer fram í londunum kring okkum. Hon fer fram uttan mun til, um Føroyar vilja taka lut ella ikki. Skulu vit fáa part av stóra ágóðanum, sum liggur í einari talgilding, so er neyðugt at verða miðvísur

Hvussu stórur hesin vinningurin verður, er torført at seta tøl á, men úti í heimi verður tosað um ein vinning upp á fleiri prosent av bruttotjóðarúrtøkuni um árið. Føroyska bruttutjóðarúrtøkan er 15 mia., so bara 1% í eitt ár er tað, sum verkætlanin kostar.

Viðløgd eru:
Fylgiskjal 3 " Upprit um nyttu gjørt av Morten Mejerhof serfrøðingi í e-governance/talgilding"
Uppritið er er gjørt í sambandi við verkætlanaruppleggið.
Fylgiskjal 3A " Metingar um nyttu gjørdar av Talgildu Føroyum

**Lógartilgongdin**
Endamálið við lógini er at tryggja, at Løgtingið kann viðgera og taka støðu til samlaðu verkætlanina Talgildu Føroyar. Lógin er í samsvari við Játtanarskipanina og § 7 í kunngerð nr. 84 frá 7. juni 2011, har ásett er, at KT-verkætlanir upp á 5 mió. kr. ella meira skulu hava heimild í og fremjast sambært verklagslóg.

Verklagslógin um Talgildu Føroyar varð løgd fyri løgtingið tann 19.november 2015. Undir nevndarviðgerðini heitti landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum á fíggjarnevndina um at

broyta lógaruppskotið soleiðis, at uppskotið í fyrsta umfari bert kom at fevna um fíggjarárið 2016 við einum fíggjarkarmi uppá 10 mió. kr.

Landsstýrismaðurin vísti á, at forkanningar innan samleika, grundardátur, talgildar tænastur og verkseting av Heldini skuldu gerast á vári 2016. Við støði í hesum bar til at meta meira nágreiniliga um kostnaðin av heildarætlanini 2017 – 2020, og harvið kundi fíggingarleistur (land, kommunur og vinna) gerast.

Ábyrgdin fyri økinum kunningartøkni hevur verið tvíbýtt millum landsstýrismannin í vinnumálum og landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum. Hetta var ikki mett at vera skynsamt, og tí varð gjørt av, at ábyrgdin av kunningartøkni varð savnað hjá einum landsstýrisfólki. Tá KT landsins er ábyrgdarøki hjá landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum, og flestu fólk við kt-førleikum vóru í hesi umsiting, var gjørt av, at savna økið undir landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum. Síðan hálvan mars í ár hevur ábyrgdin av verkætlanini Talgildu Føroyar tí verið hjá landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum.

Eitt aðalmál hevur verið at kjølfesta verkætlanina breitt í samfelagnum, og at fáa í lag avtalur við viðkomandi partar um fígging og samstarv. Eisini hevur verið arbeitt nógv við at fyrireika útbjóðing av talgilda samleikanum, og fyrireiking til hesa verklagslóg.

**Breið kjølfesting**
Talgildu Føroyar byggir á eitt tvørgangandi samstarv. Tað er avgerandi, at land, kommunur, almennar fyritøkur, felagsskapir, grunnar og privatar fyritøkur samstarva um fígging og menning. Landið hevur høvuðsábyrgdina og eigur verkætlanina, og rindar eisini størsta partin av verkætlanini. Allir partar, ið luttaka í verkætlanini, fáa umframt ávirkan á verkætlanina, eisini fíggjarligan fyrimun, tá Talgildu Føroyar verða settar í verk.

Ein stór avbjóðing við talgildum loysnum er, at tær støðugt skulu mennast, so tær áhaldandi eru tíðarhóskandi og hóska til tørvin. Skulu vit loysa hesa avbjóðingina, er neyðugt, at størstu áhugapartarnir, ið fara at gera sær dælt av talgilda frambrotinum í framtíðini, eru knýttir at verkætlanini og fáa ávirkan á, hvussu talgilda undirstøðukervið verður framyvir. Við hesum leisti verður tryggjað, at menningin hóskar til tørvin í samfelagnum, og at fleiri partar hava áhuga í eini støðugari menning av talgilda undirstøðukervinum

Talgildu Føroyar er eisini kjølfest breitt í politisku skipanini. Verkætlanin gongur tvørturum valskeið, og bæði samgonguflokkar og andstøðuflokkar hava verið við til at gera verkætlanina til veruleika.

**Lýsing av teimum 4 tættunum í verkætlanini Talgildu Føroyar**
Verkætlanin er býtt sundur í fýra megintættir: Samleiki – Portalar og Tænastur – Grundardátur – Heldin.

*Samleikin*
Ein tryggur persónligur samleiki, sum allir borgarar og fyritøkur skulu brúka at eyðmerkja seg við, tá talgildar tænastur verða brúktar. Talgildi samleikin fer at geva hvørjum einstøkum atgongd til persónligar dátur, t.d. skatta- og heilsuupplýsingar og fer at gera tað møguligt at skriva undir talgilt. Tað skal vera ein loysn, gjørd til føroysk viðurskifti, ment við kendari og væl royndari tøkni og skipanum, og teir partar sum skulu mennast, verða bodnir út til føroyskar veitarar. Loysnin verður rikin og staðsett í Føroyum.

*Portalur og talgildar tænastur*
Talgildar loysnir verða settar í verk so líðandi, á einum felags portali. So hvørt sum talgildar, oftast sjálvvirknar, skipanir taka yvir, detta tungar handaligar mannagongdir burtur, og samskiftið verður flutt frá umsitingarliga orkukrevjandi pappírsoyðibløðum, brævaskifti og teldupostum, til talgildu tænasturnar. Tænasturnar skulu vera einfaldar, brúkaravinarligar og persónligar, og borgarin og vinnan skulu kenna tað sum eina betri tænastu. Hjá teimum, sum eru tarnaði at brúka talgildar tænastur, t.d. vegna brek, skal tó framhaldandi bera til at avgreiða ørindi í telefon ella í einari avgreiðslu.

*Grundardátur*
Til tess at gagnnýta talgildingina í síni heild, krevjast fullfíggjaðar, rættar og lætt atkomuligar grundardátur.

Grundardátur eru grundleggjandi upplýsingar, ið verða brúktar av flest øllum almennum myndugleikum, borgarum og virkjum. Hesar fevna í fyrstu atløgu um *persónar*, *virki*, *fasta ogn*, *adressur*, og *talgild kort*.

Fyri at spara tíð og orku hjá øllum pørtum, skulu upplýsingar bara latast og skrásetast einaferð. Hetta merkir, at myndugleikar ikki kunnu biðja borgarar um upplýsingar, sum annar myndugleiki longu hevur skrásett. Við hesum slepst undan óneyðugum kostnaði av dupultskrásetingum, og tá ið upplýsingar bert finnast á einum stað, minkar vandin eisini fyri feilum í málsviðgerðini.

Fyri at økja um gagnnýtsluna og harvið samfelagságóðan av hesum dátum eiga at allar grundardátur skulu verða atkomuligar og ókeypis at brúka fyri øll, bæði fyri almennar og privatar fyritøkur.

*Heldin*
Fyritreytin fyri, at grundardátur kunnu verða endurnýttar er, at skipanirnar samskifta sínámillum við somu standardum í einum tryggum felags undirstøðukervi. Hetta kervið, sum verður kallað Heldin, verður ment og sett í verk stig fyri stig, við denti á fyrst at knýta teir mest brúktu og virðisskapandi dátugrunnarnar saman.

**Støðan**
Í 2016 hevur verið arbeitt við trimum av teimum fýra omanfyrinevndu tættanum, Heldini, Samleikanum og Grundardátum. Í 2017 verður farið undir fjórða tættin, Tænastur og Portalar. Verkætlanin Heldin er tann tátturin sum er komin er longst, og er í oktober mánaði alment tikin í nýtslu. Uppgávan er nú at knýta skipanir í Heldina. Forkanningar, har loysnir eru funnar og ætlan gjørd fyri ymsu partarnar, eru gjørdar av Samleikanum og Grundardátum. Eftir ætlan verður full manning á verkætlanini 1. januar 2017, og tá verður ferð sett á at fremja allar partar av verkætlanini.

**Verkætlanarbygnaður**
Talgildu Føroyar verður skipað sum ein verkætlanarskrá við fleiri undirliggjandi verkætlanum, sum allar stuðla undir sama endamáli, at menna eitt føroyskt talgilt undirstøðukervi . Fíggjarmálaráðið hevur málsøkið talgilding um hendi, og er sostatt eigari av verkætlanini. Fíggjarmálaráðið hevur latið Gjaldstovuni í hendur at fremja verkætlanina, og Gjaldstovan hevur skipað Talgildu Føroyar sum myndin niðanfyri vísir:




Av tí, at talan er um eitt talgilt undirstøðukervi fyri alt samfelagið, og eina verkætlan sum verður kjølfest og fíggjað av fleiri ymsum pørtum, verða fleiri stórir áhugapartar knýttir at verkætlanini. Umboð fyri partar, sum hava verið við til at fíggja verkætlanina verða partar av stýrisbólki, meðan aðrir partar verða knýttir at sum tilvísingarbólkar.

**Útboð v.m.**

Meginreglan hjá verkætlanini er, at allar myndugleikauppgávur verða verandi partur av almennu fyrisitingini, meðan allar menningar- og rakstraruppgávur verða bodnar út í fríari kapping við føroyskar veitarar. Undantøk vilja verða gjørd frá hesum, tá onnur loysn er meiri skynsom, t.d. vil innkeyp av standard-komponentum frá útlendskum veitara í nøkrum førum verða ein betri loysn, og tað fer í onkrum førum heldur ikki at bera til at bjóða út serliga fakliga ráðgeving.

**Hoyring**

Kunningar- og hoyringsfundir hava verið við hesar áhugapartar: Vinnuhúsið, KT-Felagið, Fakfelagssamstarvið, kommunufelagið, interkommunal feløg, peningastovnar, tryggingarfeløg, pensjónsfeløg, oljufeløg, telefeløg, almenn partafeløg, almennar fyritøkur og sosialar grunnar.

Lógaruppskotið hevur eisini ligið á almenna hoyringsportalinum hjá Føroya Landsstýri.

Eisini kann nevnast, at í fyrireikandi arbeiðinum at gera heildarætlanina fyri Talgildu Føroyar, luttóku eitt breitt úrval av áhugapørtum frá øllum pørtum av samfelagnum.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 1. Fíggjarligar avleiðingar

*Kostnaður*
Kostnaðarmetingin sum gjørd var í vár, vísir ein samlaðan verkætlanarkostnað uppá 143 mió.kr. fyri árini 2016 – 2020. Talan er um 2016 krónur, og fyri at leggja upp fyri príshækkingum í verkætlanarskeiðinum verður samlaði kostnaðurin mettur til 150 mió. kr. Av hesum eru 9 mió. kr. rakstrarútreiðslur í verkætlanartíðarskeiðinum, og tí verður skotið upp, at biðja Løgtingið um ein samlaðan løgukarm fyri árini 2016 – 2020 upp á 150 mió. kr.

**Kostnaðarætlan 2016-2020 býtt á verkætlanir  t.kr.**

| Verkætlanir | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | Tilsaman |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1.Verkætlanarskrivstova** | 1.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 9.000 |
| **2 Portalar og tænastur** | 0 | 1.450 | 5.100 | 7.400 | 13.800 | 27.750 |
| **3 Samleiki** | 5.500 | 16.150 | 12.800 | 6.100 | 6.100 | 46.650 |
| **4 Heldin** | 2.500 | 1.700 | 2.100 | 2.140 | 2.130 | 10.570 |
| **5 Grundardátur** | 1.000 | 6.825 | 13.625 | 15.985 | 9.595 | 47.030 |
| **Verkætlanarrakstur** | - | 500 | 1.500 | 3.500 | 3.500 | 9.000 |
| **Tilsamans** | **10.000** | **28.625** | **37.125** | **37.125** | **37.125** | **150.000** |

*Fígging*
Vanligt er, at tað almenna einsamalt fíggjar íløgur í vanligt undirstøðukervi. Talgildu Føroyar er eitt talgilt undirstøðukervi fyri alt samfelagið. Eitt undirstøðukervi, ið letur upp fyri fyrimunum – eisini fíggjarliga – hjá bæði fólki, vinnu og tí almenna. Tá talan er um talgildar loysnir er talan um loysnir, ið støðugt skulu mennast, so hesar eru tíðarhóskandi og hóska til tørvin. Besti mátin at tryggja hetta er, at teir størstu áhugapartarnir, ið fara at nýta talgilda undirstøðukervið í framtíðini, eru knýttir at verkætlanini og fáa ávirkan á, hvussu talgilda undirstøðukervið verður ment nú og framyvir. Á henda hátt verður tryggjað, at menningin hóskar til tørvin í samfelagnum, og at fleiri partar hava áhuga í eini støðugari menning av talgilda undirstøðukervinum. Talan er um Føroya størstu íløgu í talgilda loysn, ein loysn, sum politiska skipanin ynskir at kjølfesta breitt í øllum samfelagnum. Tí verður verkætlanin fíggjað bæði av landi, kommunum, almennum feløgum, felagsskapum og grunnum, umframt privatum feløgum.

Fíggingarleisturin land – kommunur – vinna kemur at síggja soleiðis út:

**Fígging 2016-2020 t.kr**

| Verkætlan | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | Tilsaman |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Land** | 10.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 90.000 |
| **Kommunur** | | | 8.500 | 8.500 | 8.500 | 25.500 |
| **Sponsorar** | | 8.625 | 8.625 | 8.625 | 8.625 | 34.500 |
| **Tilsamans** | **10.000** | **28.625** | **37.125** | **37.125** | **37.125** | **150.000** |

Til talvuna omanfyri skal viðmerkjast, at játtaðar eru 10 mió. kr. til verkætlanina á fíggjarlógini fyri 2016 og í játtanar kørmunum fyri 2017 – 2020 eru settar 20 milliónir krónur av árliga, og kemur parturin hjá landinum sostatt at verða 90. mió. kr. Restin av verkætlanini verður fíggjað

við at kommunur rinda 25,5 mió. kr. og aðrari sponsorar, sum t.d. interkommunal feløg, almenn partafeløg, sosialir grunnar og privat feløg rinda 34,5 mió.kr. Av teimum 34,5 mió. kr. rinda peningastovnarnir 15 mió. kr., sum eru oyramerktar til samleikan.

Fyri land og kommunur svara upphæddirnar til, at landið rindar 457 kr. pr. íbúgva um árið árini 2017 – 2020 , og kommunurnar rinda 129 kr. pr. íbúgva um árið árini 2017 – 2020.

Kommunala luttøkan verður lógarásett, og býtið millum einstøku kommunurnar verður grundað á fólkatalið í kommununum 1. februar 2016 (sí skjal 4). Kommunufelagið og umboð fyri kommunurnar hava verið við í fyrireikingini av Talgildu Føroyum. Fíggjarmálaráðið hevur samskift við Kommunufelagið um fíggingarleistin.

Við undantaki av landi og kommunum, er luttøkan frá áhugapørtunum grundað á ítøkiligar avtalur. Hesar eru gjørdar eftir, at fundir hava verið við hvønn einstakan av hesum.

Býtið millum áhugapartar, ið eru bodnir við at fíggja, er í størst møguligan mun grundað á stødd og hvørja nyttu teir fáa av verkætlanini.

Torført er at koma við neyvum metingum um, júst hvussu nógv kann sparast við at fremja heildarætlanina, men ábendingar kunnu fáast við at hyggja eftir londum, ið longu hava sett tey átøk í verk, sum verða nevnd í heildarætlanini. Í Estlandi t.d. meta myndugleikarnir, at samlaða sparingin av at seta talgildu undirskriftina í gildi og fremja hana í verki, er heili 2 prosent av BTÚ.

**2. Umsitingarligar avleiðingar**

So hvørt sum ymisku tænasturnar verða talgildar, verður møguligt hjá borgaranum at avgreiða síni viðurskifti á alnótini, og hetta fer at frígeva orku í umsitingini hjá almennu stovnunum og privatum fyritøkum. Harafturat fara talgildar verkgongdir at standardisera og gera málsviðgerðina einfaldari og skjótari til gagns fyri bæði almennar myndugleikar og privatar fyritøkur.

**3. Umhvørvisavleiðingar**

Talgilding av tænastum letur upp fyri, at minni pappír verður brúkt í privatari- og almennari umsiting.

**4. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**

Talgildu tænasturnar og talgildi samleikin fara at geva fólki í útjaðaranum og sjófólki á fjarleiðum betri møguleikar at avgreiða síni viðurskifti uttan ta tíðar- og orkunýtslu, sum fer til slíkt í dag.

**5. Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**

Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

**6. Avleiðingar í mun til millumtjóðasáttmálar**

Uppskotið er mett í mun til Mannarættindasáttmálan og ST-sáttmálan um rættindi hjá teimum, ið bera brek.

Talgildu Føroyar fara at styrkja støðuna hjá teimum, ið bera brek. Tí talgildingin vil lætta um atgongdina til almennar tænastur v.m.

Neyðug fyrilit verða tikin í verkætlanini, so uppskotið verður í samsvari við Mannarættindasáttmálan. Uppskotið hevur fyrilit fyri ásetingunum í ST-sáttmálanum um rættindi hjá teimum, ið bera brek, tí eingin skal verða forðaður í at fáa lut í talgildu Føroyum. Talgildingin fer hinvegin at gera tað lættari hjá teimum, ið bera brek, og teimum, ið eru førleikaskerd.

Tøknin skal geva øllum atgongd til okkara talgilda samfelag. Talgildingin skal gera tað lættari hjá hesum at brúka almennu tænasturnar og aðrar tænastur í felags kervinum.

**7. Sosialar avleiðingar**
Talgildingin hevur jaligar sosialar avleiðingar fyri borgarar í síni heild.
Talgildingin skal gera tað lættari hjá teimum við skerdum førleika, teimum, sum eru stødd á útoyggj, til skips ella uttanlands at brúka almennu tænasturnar og aðrar tænastur í felags kervinum.

**Talva 1: Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar / felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1:**
Ásetingin gevur landsstýriskvinnuni heimild at halda útreiðslur til verkætlanina Talgildu Føroyar. Mett verður, at samlaða upphæddin fyri verkætlanina árini 2016-2020 er 150 mió. kr. Álagt verður kommununum at bera 25,5 mió. kr. av hesi upphædd, og miðja verður eftir, at privatar og almennar fyritøkur og grunnar bera 34,5 mió. kr. av samlaða kostnaðinum.

**Til § 2:**
Áseting um gildiskomu. Greinin ásetur eisini, nær lógin fer úr gildi. Tískil er heimildin hjá landsstýriskvinnuni tíðaravmarkað.

Fíggjarmálaráðið, xx. januar 2017

Kristina Háfoss
landsstýriskvinna

/Bjarni Askham Bjarnason

**Hjáløgd fylgiskjøl:**

Fylgiskjal 1: Talgildu Føroyar - Heildarætlan
Fylgiskjal 2: Talgildu Føroyar Kostnaðarætlan
Fylgiskjal 3: Upprit um nyttu gjørt av serfrøðingi í e-governance/talgilding
Fylgiskjal 3A: Upprit um nyttu gjørt av Talgilu Føroyum
Fylgiskjal 4: Býtið av fígging millum kommunur
Fylgiskjal 5. Framløga um verkætlanina



# TALGILDU **FØROYAR**

01110100 01100001 01101100 01100111 01101001 01101100 01100100 01110101
01100110 11000011 10111000 01110010 01101111 01111001 01100001 01110010

## HEILDARÆTLANIN 1. OKTOBER 2015

# Innihald

Heildarætlanin Talgildu Føroyar ..... 3
Verkætlanarbygnaður ..... 4
Samandráttur og tilmæli ..... 6
Visjónin  Talgildu Føroyar - lættari, betri og bíligari fyri samfelagið ..... 10
Meginreglur fyri Talgildu Føroyar ..... 11
Lóggáva og rættartrygd ..... 12
Talgildar Tænastur - Alt á einum stað ..... 13
Talgildur Samleiki - Eitt ómakaleyst samleikaprógv ..... 14
Grunddáta og KT-arkitekturur ..... 17
Myndugleiki og bygnaður ..... 18
Talgildu Føroyar fyri øll ..... 20
Átøk og kostnaðarætlan 2016-2020 ..... 22

# Heildarætlanin Talgildu Føroyar

**Farið verður undir at seta skjøtul á at talgilda tænastur til borgarar, vinnu og almenna geiran í Føroyum. Higartil hevur eingin yvirskipað samskipan av talgildingini í Føroyum verið. Hetta hevur við sær, at tað ikki í nóg stóran mun verður hugt eftir heildini, ella møguleikanum at endurnýta verandi skipanir og skráir.**

**Endamál:** Talgildingin hevur til endamáls at nútímansgera vælferðina og tænasturnar hjá føroyingum og skal  vera við til at skapa kappingarføri, vøkstur og framleiðsluorku,  umframt at tryggja munandi sparingar og effektiviseringar í almenna geiranum.

**Talgildingin hevur við sær**, at borgarar og virki samskifta talgilt við almenna geiran , at fyrisitingarligar tænastur hjá tí almenna eru tøkar á netinum, og at veitingar og mannagongdir í almennu fyrisitingini eru talgildar.

Ein av grundarsteinum undir at talgilda samfelagið er at hava eina trygga talgilda undirskrift.

Vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið eru stigtakarar og hava evstu ábyrgd av verkætlanini.

Heildarætlanin er grundarlag fyri arbeiðið at talgilda Føroyar í árunum 2015-2020.

Á heimasíðuni www.talgildu.fo verða einstøku verkætlanarpartarnir útgreinaðir so hvørt sum verkætlanin mennist og verður framd.

# Verkætlanarbygnaður

## Bygnaður

Arbeiðið verður skipað sum ein samlað verkætlanarskrá (programm) við yvirskipaðari programmleiðslu og tvørgangandi ráðgeving og fýra fokuseraðum verkætlanum.

Verkætlanarskráin vísir til stýrisbólkin, sum vísir til landsstýrisfólkini fyri UVMR og FMR.

Bygnaðurin kann byggjast út eftir tørvi og verður fluttur í ein rakstrarbygnað so hvørt sum verkætlanirnar verða framdar. Hesin bygnaðurin er væl lýstur í verkætlanarsporinum: Myndugleiki og bygnaður.

Verkætlanin byrjaði í apríl 2015. Sum liður í arbeiðinum hava verið verkstovur, samrøður og ráðførslur við viðkomandi áhugapartar – bæði KT-veitarar, stovnar og kommunur og umboð fyri vinnuna. Royndir úr øðrum londum hava verið gagnnýttar, m.a. luttóku serfrøðingar úr Estlandi og altjóða serfrøðingar, sum hava hjálpt smátjóðum við talgildingarstrategium. Eisini hava fólk frá Fróðskaparsetrinum, stovnum, kommunum og vinnuni tikið lut í arbeiðinum.




**Umframt verkætlanarbólkin hava hesi verið við í arbeiðinum:**

**Talgildar tænastur:** Durita Tausen, Gjaldstovan og Rókur Tummasarson, Tórshavnar kommuna.

**Talgildi Samleiki:** Petur Mittún, Tórshavnar kommuna, Frankie Jensen, Almannaverkið og Bárður Háskor, ráðgevi.

**KT arktitektur og grunddátur:** Hans Blaasvær, KT-húsið og Yngvi S. Guttesen, Nema.

**Myndugleiki og bygnaður:** Nicolai M. Balle, KT landsins, Birgir av Steinum, KT landsins, Morten Meyerhoff Nielsen, ráðgevi.

**Hesir áhugabólkar, stovnar og fyritøkur hava luttikið í arbeiðinum:**

Heilsumálaráðið, Mentamálaráðið, TAKS, Nám, Studni, Vørn, Akstovan, Heilsufrøðiliga starvsstovan, Landssjúkrahúsið, Klaksvíkar Sjúkrahús, Suðuroyar Sjúkrahús, Apoteksverkið, Almannaverkið, Skráseting Føroya, Umhvørvisstovan, Heilsutrygd, Strandfaraskip Landsins, Hagstovan, Tórshavn kommuna, SEV, umboð fyri útjaðaran, KT-vinnan, POSTA, Føroya Tele, Landsfólkayvirlitið, ALS, Trygdargrunnurin, Vinnustovnurin, Fiskimálaráðið, KT-landsins, Gjaldstovan, Runavíkar kommuna, Kommunufelagið, Landsskjalasavnið, Dátueftirlitið, Elektron, Formula, Nema, EGA – E-Governance Academy (Estland), RIA - Estonian Information System Authority, Cybernetica AS (Estland), Digitaliseringsstyrelsen (Danmark), Statens IT (Danmark), Dr. Jon Thorhallsson - Internal Revenue Advisor (Ísland), Brúkararáðið hjá Landsnet, IRF, Magn, Effo, Trygd, LÍV, Tryggingarfelagið Føroyar, Bank Nordik, Eik, Kringvarp Føroya, Búnaðarstovan, Sjóvinnustýrið og Fróðskaparsetur Føroya.

# Samandráttur og tilmæli

## Avbjóðingin

Skeiva aldurs- og kynsbýtið er millum størstu avbjóðingar landsins. Komandi árini fer miðalaldurin í Føroyum at hækka og verður einki gjørt, gerst umsitingin ein alsamt tyngri partur av búskapinum. Neyðugt er at finna leiðir til at fjøltátta búskapin, birta upp undir nýggjar vinnur, økja samstarvið og samskipanina millum landsmyndugleikar, kommunur, vinnu og felagsskapir, og menna eina smidliga og effektiva almenna umsiting.

Royndir úr øðrum londum vísa, at talgilding kann verða partur av loysnini.

- Í Estlandi verður mett, at samfelagsbúskarpaligi vinningurin av at seta í verk talgildan samleika og undirskrift, er upp ímóti 2% av BTÚ.
- Danskir myndugleikar vænta, at til ber at spara upp í 3 mia. kr. við at taka burtur pappírs-oyðubløð og brøv.
- Í ES verður mett, at endurnýtsla av grunddáta kann geva upp til 2% vøkstur í BTÚ, og
- í Niðurlondum hevur niðurlaging av skrivstovuveldinum givið ein samfelagsbúskaparligan vinning upp á 0,9% av BTÚ.

Samanumtikið er stórur samfelagsligur vinningur við at talgilda. Men tað krevur, at stór tøk verða tikin sum hesi, ið heildarætlanin Talgildu Føroyar 2016-2020, mælir til.

## Loysnin

Eitt einfaldari regluverk og niðurlaging av skrivstovuveldinum við talgilding kann skapa fíggjarligt rúm til at lofta avbjóðingunum av fólkasamansetingini, til at gera útbúgvingartilboð og góðar karmar fyri nýggjum vinnum.

Endamálið við heildarætlanini er at geva greið tilmæli um týdningarmestu stigini til at menna talgilda undirstøðukervið, so at almennir myndugleikar og vinnan kunnu nýta talgildingina til at gerast effektivari, og so at borgarin fær betri, skjótari og bíligari tænastur.

Hetta merkir m.a., at talgildi samleikin verður mentur og rikin sentralt, men tað eru teir einstøku myndugleikarnir, kommunurnar, bankarnir og aðrir partar sum skulu tryggja, at talgildi samleikin gevur atgongd til teirra tænastur, so sum skattur, fráboðan um flyting, netbanki, heilsujournal o.s.fr.

Hetta merkir eisini, at ein felags talgildur portalur verður mentur og rikin sentralt, og at tað eru eisini teir einstøku myndugleikarnir sum skulu bera so í bandi, at teirra skipanir eru atkomiligar á einum felags borgaraportali, og sum skulu tryggja, at tøknin og KT-nýtslan innan teirra øki eru dagførdar, so at tær hóska til undirstøðukervið, leiðreglurnar og standardirnar, sum heildarætlanin hevur til endamáls at menna.

Jú betur arbeitt verður samsvarandi heildarætlanini, tess betri verður úrslitið av talgildingini. Hon verður meira fullfíggjað, fleri grunddátur verða endurnýttar, sleppast kann undan dupultskráseting o.s.fr. Í stuttum fæst besta nyttan burtur úr einari felags tilgongd, heldur enn at øll arbeiða hvør í sínum lagi.

## Fyritreytir

Føroyar eru væl fyri, tá ið mált verður, hvussu nógvir av landsins borgarum hava atgongd til internetið heima (92%). somuleiðis eru útoyggjarnar væl íbundnar, umframt at flest øll hava fartelefon (1,2 fartelefon fyri hvønn íbúgva)

KT-infrakervið í Føroyum er vælútbygt og almennu KT-skipanirnar eru búnar at knýta saman og at gerast atkomiligar sum sameindar talgildar tænastur til borgarar og vinnu.

## Nytta

So hvørt sum talgildu loysnirnar í heildarætlanini verða framdar í verki, økist samfelagsligi ágóðin. Tað fer at gerast alsamt lættari og minni tíðarkrevjandi hjá borgarum at avgreiða síni viðurskifti við tað almenna, og tað fer eisini at gera tað munandi lættari hjá fyritøkum og stovnum at tæna kundunum.

Málið er, at nógv av tí tilfeingið, sum í dag fer til umsiting, skráseting og eftirkanning verður frígivið, soleiðis at stovnar og fyritøkur fáa hugsavnað seg um sínar kjarnutænastur og harvið fáa veitt kundunum eina betri tænastu, bæði innan tað almenna og tað privata.

Einki er at ivast í, at eitt úrslit av heildarætlanini verður ein effektivari og smidligari almennur geiri, sum alt annað líka, verður bíligari at reka. Tað merkir, at játtaði peningurin til ymisku vælferðarøkini verður skynsamari brúktur.

Torført er at koma við beinraknum metingum um, júst hvussu nógv kann sparast við at fremja heildarætlanina, men ábendingar fáast við at kaga eftir londum, ið longu hava sett tey átøk í verk, sum verða nevnd í heildarætlanini.

Í Estlandi metir fíggjarmálaráðið, at samlaða sparingin av at seta talgildu undirskriftina í gildi og fremja hana í verki, er heili 2 prosent av BTÚ. Roknað um til føroysk viðurskifti, svarar tað til eina sparing á umleið 300 mió. kr. árliga. Um bert helmingurin av hesi sparing fæst til høldar í Føroyum, merkir tað eina sparing á 150 mió. kr. Sparingin er roknað sum tann tíðarsparing, ið fæst við at nýta talgildu undirskriftina og atknýttu talgildu tænasturnar.

So hvørt einstøku ætlanirnar verða nærri projekteraðar, verður lættari at spáa um nyttuvinningin, ið spyrst burturúr.

# Heildarætlanin 2016-2020

Heildarætlanin er býtt í fýra megintættir:

## 1. Talgildur samleiki, undirskrift og fulltrú

**Ein** tryggur persónligur lykil og talgild eyðmerking fyri allar borgarar og fyritøkur, sum kann brúkast av øllum veitarum av talgildum tænastum, almennum og privatum. Talgildi samleikin vil eisini geva atongd til persónlig dáta, t.d. skatta- og heilsuupplýsingar og kann brúkast til talgilda undirskrift og til at geva øðrum fulltrú. Tað skal vera **ein** loysn, gjørd til føroysk viðurskifti, ment við kendari og væl royndari tøkni og skipanum, og loysnin skal vera staðsett í Føroyum.

Roknað er við teirri fortreytini, at privata vinnan, bankar og onnur, luttaka í fíggingini av loysnini, og at ein autoritativur samleiki verður galdandi fyri øll fólk (p-tal) og fyri allar løgfrøðiligar eindir (V-tal) (sí fylgiskjal 1).

***Virðisskapanin er treytað av, at loysnirnar verða útbreiddar og brúktar (sí fylgiskjal 2).***

## 2. Portalur og talgildar tænastur

Talgildar loysnir verða settar í verk so líðandi, á einum felags portali, fyri at hækka dygdina og effektivitetin í almennum tænastum. So hvørt sum talgildar, oftast sjálvvirknar skipanir taka yvir, verða pappírs-oyðubløðini tikin burtur og samskiftið verður flutt frá brøvum í talgildu tænasturnar. Tænasturnar skulu vera einfaldar, brúkaravinarligar, persónligar og borgarin og vinnan skulu kenna tað sum eina betri tænastu.

Hetta fer at minka um skrivstovuveldið, geva viðskiftafólkunum skjótari og betri tænastu og spara orku í almenna geiranum. Tað skal framhaldandi bera til at avgreiða ørindi í telefon ella í einari avgreiðslu hjá teimum, sum hava tørv fyri hesum.

***Virðisskapanin er treytað av brúkaravinaligum tænastum, talgilda samleikanum, samstarvi millum myndugleikar og vinnu og at borgarar og vinna taka talgildu loysnirnar til sín.***

## 3. Grunddáta

Grunddátur eru grundleggjandi upplýsingar, ið verða brúktar av flest øllum almennum myndugleikum, borgarum og virkjum. Hesi fevna í fyrstu atløgu um upplýsingar um persónar, virki, fasta ogn, adressur, topografisk kort, myndakort, matrikulkort og lendisskipanir.

Fyri at spara tíð og orku hjá øllum pørtum, skulu upplýsingar bara latast og skrásetast eina ferð. Hetta merkir, at myndugleikar ikki kunnu biðja borgarar um upplýsingar, sum annar myndugleiki longu hevur skrásett. Við hesum verður sloppið undan óneyðugum kostnaði av

dupultskrásetingum og tá ið upplýsingar bert finnast á einum stað, minkar eisini vandin fyri feilum í málsviðgerðini.

Neyðugt er at finna loysnir fyri fígging og rakstri av skipanunum, so at myndugleikar ikki skulu senda hvørjum øðrum rokningar fyri at veita atgongd til upplýsingar. Hetta gagnar ongum, og virkar bara forðandi fyri talgildingina.

Tá talgildingin er komin longur, skulu dátur, ið ikki kunnu sporast aftur til ávísar persónar, eisini kunna gagnnýtast av privatu vinnuni, til at menna nýggjar loysnir og tænastur. Hetta er sjálvandi innan teir karmar, sum persónsdátalógin loyvir. Meginreglan er at grunddátur skal verða atkomuligar og ókeypis hjá øllum.

***Virðisskapanin verður tá ið dátur verða deildar og endurnýttar, í málsviðgerð og í talgildum tænastum.***

## 4. KT-arkitekturur - Heldin

Fortreytin fyri, at grunddátur kunnu verða endurnýttar, er, at skipanirnar samskifta sínámillum við somu standardum í einum felags almennum undirstøðukervi. Hetta kervið, sum vit hava givið navnið Heldin, verður ment og verksett stig fyri stig, við denti á fyrst at knýta teir mest brúktu og virðisskapandi dátugrunnarnar saman.

***Virðisskapanin verður tá ið dátur verða fluttar millum skipanir og endurnýttar.***

# Visjónin

## Talgildu Føroyar - lættari, betri og bíligari fyri samfelagið

Stór menning fer fram innan KT og talgilding, og Føroyar eru í fremstu røð á summum økjum. Eitt nú kunnu nevnast *Talgilda Heilsuskipanin* og *Búskaparskipan Landsins*. Í Føroyum er talgildingin tó í mestan mun farin fram á tann hátt, at einstøku stovnarnir hvør í sínum lagi hava ment sítt talgilda virksemi, heldur enn eftir eini yvirskipaðari ætlan og kós til frama fyri alt føroyska samfelagið.

Avleiðingin er, at á summum økjum og geirum eru KT-skipanir ikki nútímansgjørdar og samskifta ikki sínámillum, og vit eru eftirbátur, tá ið tað ræður um talgildar tænastur, har borgarar og vinna kunnu avgreiða síni viðurskifti á netinum. Hetta merkir, at vit hava tungar og tíðarkrevjandi arbeiðsgongdir og nógv dømi um dupultfunktiónir. Hetta hevur við sær, at óneyðug arbeiðsorka, tíð og peningur verða nýtt. Tilfeingi, sum kundu verið brúkt øðrvísi og meira skynsamt.

Føroyar hava møguleikan at gerast eitt undangonguland innan talgilding av tænastum, um røttu fyritreytirnar eru til staðar. Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava í felag tikið stig til heildarætlanina, og ein verkætlanarbólkur er settur at gera eina 5-ára ætlan fyri at talgilda almennar tænastur. Átakið hevur heitið: *Talgildu Føroyar* og hevur til endamáls at:

- Nútímansgera vælferðina og tænasturnar hjá føroyingum
- Útvega fyritreytir fyri effektiviseringum í almenna geiranum
- Skapa størri kappingarføri, vøkstur og framleiðsluorku Høvuðsmál í ætlanini eru:

Fyri at røkka hesum er ein fyritreyt at:

- Borgarar og virki kunnu samskifta og avgreiða síni viðurskifti við tað almenna - eitt nú um borgara- og virkisportalar
- Tænastur hjá tí almenna og hjá vinnuni eru tøkar á netinum
- Veitingar og mannagongdir í tí almenna eru talgildar

# Meginreglur fyri Talgildu Føroyar

### Upplýsingar skulu bara latast eina ferð

Myndugleikar kunnu ikki krevja upplýsingar, sum longu finnast í almennum skráum. Hetta skal gera tað tryggari, minka um dupultarbeiði og ikki minst gera tað einfaldari at samskifta við myndugleikar og aðrar tænastuveitarar.
Í dag eru almennar upplýsingar sum navn og bústaður skrásettar í uml. 20 ymiskum skráum. Tað er tvørligt hjá øllum at halda viðlíka, og nógvir feilir koma, tí at upplýsingar ikki verða dagførdar. Tí skulu øll draga almennar upplýsingar úr somu skráum.

### Tú eigur tínar persónligu upplýsingar

Tað verður ásett í lóg, hvørjar grundskráirnar eru, hvør hevur ábyrgd av at viðlíkahalda tær, og hvørt upplýsingarnar eru almennar, ella um borgarin í hvørjum føri sær skal geva loyvi til, at upplýsingarnar verða brúktar av einum øðrum myndugleika.

### Talgildingin skal einfalda umsitingina

Endamálið við at talgilda skal altíð vera at tryggja mest einføldu, tryggu og skynsomu loysnina. Tað ber í sær, at umsitingarligar siðvenjur, reglur, mannagongdir og bygnaðir mugu endurskoðast, og um neyðugt tillagast, tá ið tænastur verða talgildar.

### Talgildingin skal vera samskipað

Almennir myndugleikar hava skyldu at samstarva um at menna talgildar tænastur, millum annað eina felags inngongd, haðani borgarin ella fyritøkan kann velja tær almennu tænasturnar, sum viðkomandi skal brúka.

### Ein talgildur samleiki og ein felags innritan

Í framkomna talgilda samfelagnum skal bera til at brúka somu innritan til allar almennar tænastur, og til tær privatu tænasturnar, sum knýta seg í felags kervið.

### Ein evsti almennur myndugleiki borgar fyri trygd og góðsku

Føroyum tørva eina samskipaða dátutilbúgving, og hetta gerst alt meiri átrokandi so hvørt, sum føroyska samfelagið og heimurin allur verður meira talgildur.

Tí er neyðugt at **ein** myndugleiki fær evstu ábyrgd av samlaðu KT-trygdini og myndugleika at seta neyðug krøv til teirra, sum skulu veita føroyingum talgildar tænastur á felags kervinum.

### Borgarin í miðdepilin

Loysnirnar koma at laga seg eftir tí, sum kennist náttúrligt og einfalt hjá brúkarunum. Tí kunnu tað eisini vera fleiri vegir til somu tænastur, so at tú kanst velja, um tú brúkar høvuðssíðuna, ella fert við fartelefonini ella teldli beint til ta tænastuna, sum tær tørvar.

Krøv verða sett til góðan og tilvitaðan málburð á teimum pallum, sum bjóða talgildar tænastur. Hetta er eitt øki í støðugari menning, og tí er eisini neyðugt framhaldandi at raðfesta føroyska málið á føroyskum heimasíðum og tænastum hjá føroyskum myndugleikum, bankum og øðrum,

ið ynska at gagnnýta almenna kervið. M.a. skulu knøttar og valmyndir, ið ganga aftur á nógvum ymiskum síðum, navngevast við umhugsni, og so vítt til ber samskipast og endurnýtast, so at tænasturnar verða greiðar, samanhangandi og einfaldar at nýta.

**Alt sum kann, skal verða útveitt**
Talgildingin av samfelagnum førir við sær nógvar nýggjar vitanartungar uppgávur og gevur grundarlag fyri at menna nýggjar KT-loysnir, ið hóska til smá samfeløg. Talgildingin er tí eitt givið høvið at styrkja og fjølga um føroysku KT-vinnuna í breiðastu merking. Les meira um útveiting her.

**Talgilding fyri øll**
Eingin skal verða forðaður í at fáa lut í talgildu Føroyum. Talgildingin skal hinvegin gera tað lættari hjá teimum, ið bera brek, ið eru førleikaskerd, ella sum eru stødd á útoyggj, til skips ella uttanlands at brúka almennu tænasturnar.

Skipanirnar mugu taka atlit til, at fólk flyta til Føroyar, sum enn ikki eru stinn í føroyskum máli. Hjá teimum má bera til at fáa somu atgongd til tænasturnar á enskum. Hetta kann hjálpa tilflytarum at gerast partur av føroyska samfelagnum. Harafturat kann tað gera tað skjótt og einfalt at brúka føroyskar loysnir í øðrum londum, og tað verður tí lættari hjá føroyskum mennarum at útflyta føroyskar skipanir.

# Lóggáva og rættartrygd

**Fyri at fremja talgildingina í verki, er umráðandi, at talgildingin verður skipað við skynsamari lóggávu.**

Talgildingin fer ikki at geva almennum myndugleikum aðrar upplýsingar enn tær, ið frammanundan verða latnar. Talgildingarlógin skal skapa karmarnar fyri talgilda samskiftinum millum tað almenna, borgarar og vinnu og fer ikki at víðka tær heimildir, sum almennir myndugleikar hava í dag.

**Talgildingarlóg**
Gjørd verður ein talgildingarlóg, sum nágreinar rættindi og skyldur hjá bæði borgarum og tí almenna. Í stuttum snýr talgildingarlógin seg um, at tað almenna fær heimild at talgilda samskiftið við borgarar og vinnu. Lógin fer at halda seg til tær meginreglur, sum frammanundan eru galdandi, serliga í mun til persónsupplýsingar, dátutrygd og rættartrygd.

**Verandi lóggáva**
Fyrsta stigið er at viðgera og meta um ta lóggávu, sum er galdandi í Føroyum, og sum føroyskir myndugleikar hava ræðið á. Metast skal um, hvørt lóggávan í verandi líki forðar fyri talgilding, ella um lóggávan er soleiðis háttað, at talgilding kann fremjast uttan lógarbroyting. Metast skal eisini um, hvørt verandi lóggáva er nøktandi, serliga í mun til *cyber security* og viðkomandi heimildir hesum viðvíkjandi.

Settur verður ein arbeiðsbólkur, umboðandi øll stjórnarráð, at viðgera og meta um, hvørt forðingar fyri talgilding eru í galdandi lóggávu. Bólkurin skal gera uppskot til dagføringar og tillagingar. Metast skal eisini um, hvørt tað í ávísum førum er skynsamt at varðveita verandi (pappírs) fyrisiting í eini skiftistíð, um økið, sum lóggávan skipar, ikki er búgvið at talgilda.

**Lógartillagingar og dagføringar**
Neyðugar tillagingar og dagføringar kunnu gerast í einum, t.e. við einari samlaðari broytingarlóg. Hetta kann eisini gerast í fleiri umførum.

**Nýggjur lóggávuleistur**
Komandi lógarsmíð skal hava fyrilit fyri, at alt størri partur av fyrisitingini verður talgildur.

Nýggi lóggávuleisturin verður mentur í samstarvi millum Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Fíggjarmálaráðið (Gjaldstovuna) og Løgmansskrivstovuna (Lógardeildina og Dátueftirlitið).

# Talgildar Tænastur - Alt á einum stað

**Ein felags inngongd skal gera tað lættari, skjótari og tryggari at røkka almennum og privatum, talgildum tænastum. Ein trygg innritan, ein talgildur postkassi, ein talgild undirskrift og allar tænasturnar savnaðar á einum stað alt samdøgrið. Ein felags portalur, sum kann brúkast á teldu, teldli og telefon.**

Tænasturnar skulu mennast við borgaranum í miðdeplinum. Fyrsta stig er, at borgarin sjálvur kann velja tær tænastur, honum tørvar. Næsta stig er, at skipanirnar skulu laga seg til hvønn einstakan borgara og skulu bjóða tær tænasturnar, sum eru viðkomandi í mun til t.d. aldur, hjúnastøðu og starv.

**Skjótt syftir seiðir**
Fleiri talgildar tænastur eru longu rættiliga framkomnar, aðrar eru ávegis; men tað eru eisini nógvir, smáir stovnar og smáar kommunur, sum ikki bjóða talgildar tænastur enn.

Ein felags portalur kann taka støði í loysnunum, sum rigga væl í dag, og kann so líðandi mennast og bjóða fram pakkaloysnir, so at tað verður lættari og bíligari at talgilda smærri tænastur eisini.

**Føroya fólk eru klár til talgilding**
Royndir við talgildum tænastum, sum virka í dag, vísa, at fólk eru skjót at taka hesar til sín. Ein felags portalur við afturkenniligum sniði og funkum skal gera tað enn lættari hjá fólki at brúka tænasturnar. Tær skulu frá byrjan sniðgevast við fyriliti fyri teimum fólkunum, sum hava flest avbjóðingar við at røkka talgildu tænastunum.

**Skynsom umsiting**
At talgilda tænasturnar eftir sama leisti sparir eisini tíð og orku í umsitingunum. Tíð, sum í dag

verður brúkt til at skráseta, skipa og leita eftir upplýsingum, kann brúkast til at hjálpa og ráðgeva borgarum og vinnu og til at menna støðugt betri tænastur.

**Stigvís menning**
Fyrsta stig verður at menna eina lutfalsliga einfalda loysn, ið gagnnýtir verandi portalar og tænastur. Henda kann vera klár at seta í verk í 2017.




# Talgildur Samleiki - Eitt ómakaleyst samleikaprógv

**Borgarar og vinna fara í alsamt størri mun at samskifta og avgreiða síni viðurskifti við tað almenna talgilt umvegis e-tænastur og borgaraportalar, og tí fáa øll sín egna talgilda samleika – eitt talgilt samleikaprógv.**

Talan verður um ein og sama talgilda samleika, sum kann nýtast til innritan og eyðmerking á portalum og snarskivum, bæði hjá stovnum, myndugleikum og fyritøkum.

Ein talgildur samleiki ger tað skjótari og einfaldari hjá borgarum at avgreiða síni viðurskifti. Samstundis verða mannagongdir hjá almennum stovnum minni tíðar- og orkukrevjandi, tí sloppið verður undan eitt nú at ljóslesa pappír.

Seinnu árini er gerandisdagur okkara vorðin alsamt meira talgildur. Flestu upplýsingar verða varðveittar hjá teimum myndugleikum og fyritøkum, vit hava samband við. Vit borgarar goyma eisini upplýsingar okkara á teldum o.ø. talgildum tólum.

Seinastu árini er tørvurin at kunna eyðmerkja seg talgilt vaksin støðugt. Fleiri og fleiri skipanir eru komnar við onkrum slagi av innritan, tá ið vit skulu hava ella senda upplýsingar til fyritøkur og stovnar.

Sum tørvurin at geva upplýsingar sínámillum veksur, veksur eisini tørvurin at senda trúnaðarupplýsingar trygt og einfalt. Tí síggja vit, at alsamt fleiri lond seta í verk landsumfevnandi loysnir at eyðmerkja borgarar, fyritøkur og aðrar løgfrøðiligar myndugleikar.

Við at seta í verk eina felags, talgilda loysn fyri alt samfelagið, fæst ein einføld skipan. Hetta merkir, at borgarin kann nýta ein og sama hátt til at innrita í skipanirnar.

Fyri samfelagið er tað stórur fyrimunur, av tí at tað skulu ikki stovnast fleiri ymiskar skipanir fyri tær einstøku tænasturnar, har eyðmerking og innritan er. Tí fer ein felags loysn fyri alt samfelagið at viðføra munandi sparingar fyri allar partar, bæði í tíð og umsiting.

Talgildi samleikin er samansettur av pørtum, og hvørt land samansetur sína skipan við støði í sínum tørvi. Eins og onnur lond hava vit í Føroyum okkara serligu ynskir. Arbeiðsbólkurin hevur tí gjørt ein myndil fyri eina loysn, sum hóskar fyri Føroyar við støði í hesum kravfestingum:

- Ein felags loysn (breið undirtøka)

Borgarar, vinna og tað almenna skulu kunna nýta loysnina at samskifta sínámillum. Loysnin skal kunna nýtast í øllum pørtum av samfelagnum, so at borgarin kann nýta talgilda lykilin (samleikan) til at eyðmerkja seg hjá almennum stovnum og privatum fyritøkum. Allir borgarar skulu kunna nýta loysnina.

- Føroyskir førleikar og veitarar

Føroyskir veitarar verða nýttir, so ein kann tryggja sær, at neyðugir førleikar eru her heima, og so at framtíðar rakstur og menning ikki eru bundin at útlendskari arbeiðsmegi.

- Trygg loysn

Loysnin skal vera trygg, so at hon lýkur lóggávu og regluverk fyri økið, umframt krøv hjá Fíggjaeftirlitinum um trygd og reglur fyri hvítvask.

- Einføld og brúkaravinarlig

Loysnin skal vera einføld og løtt at nýta hjá borgarum.

- Framtíðartryggjað og altjóðagjørt

Loysnin skal vera framtíðartryggjað og smidlig í bygnaði, so at hon kann mennast til nýggjar tørvir. Hon skal eisini vera í samsvari við altjóða standardir og skipanir, so at føroyski, talgildi samleikin í framtíðini skal kunna nýtast í øðrum londum.

- Málið skal vera føroyskt og enskt

Málið og allur tekstur til brúkaran skal vera á føroyskum. Við fyriliti fyri útlendingum skal tað eisini vera á enskum.

- **Ognarskapur og staðseting skulu vera føroysk**

Tað almenna eigur og umsitur teir sentralu partarnar, sum fevna um trygdina. Viðkvæmar upplýsingar og trúnaðarupplýsingar um borgaran og sentralu partarnar av skipanini verða staðsettar í Føroyum. (Talgilt yvirræði).

- **Fíggarligt skynsemi**

Samsvar skal vera millum vavið á loysnini og fíggingina. Gerast skal ein skynsom virkisætlan fyri loysnina.

## Talgildi samleikin

Samleikin er samansettur av eini trygdarkjarnu og átta ymiskum pørtum. Partarnir verða mentir og verksettir stigvíst næstu 3-5 árini.




## Tíðarætlan:



# Grunddáta og KT-arkitekturur

Upplýsingar skulu bara latast og skrásetast eina ferð. Allir myndugleikar og tænastur skulu heinta upplýsingar úr somu grundskráum, sum verða ókeypis. Trygt samskifti millum skráir fer umvegis Heldina, ið er netverkið, sum heldur Talgildu Føroyar saman.

Stovnar skulu ikki senda hvørjum øðrum rokningar fyri at veita atgongd til upplýsingar, tí tað gagnar ongum og virkar bara forðandi fyri talgildingina.

Hjá privatum veitarum gerast eitt nú ókeypis kortdáta eitt nýtt tilfeingi til teirra, sum hava hugflog at menna nýggjar tænastur til føroyska marknaðin og til allan heimin.

## Niðurstøður viðvíkjandi grunddáta

- Grunddáta skulu bert skrásetast einaferð, eitt stað
- Dagførd grunddáta skulu altíð vera tøk
- Tað skal vera ómakaleyst at fáa fatur í grunddáta
- Tað skal vera ókeypis at fáa fatur á grunddáta
- Tað skal vera lætt at finn út av hvørjir upplýsingar eru tøkir og hvussu ein fær fatur í teimum
- Tað almenna skal altíð hava fulla atgongd og ræðisrætt yvir almennu skráum
- Skráir við grunddáta eiga at mennast og víðkast við upplýsingum sum hava felags áhuga - t.d. telefonnummar hjá persónum
- Eitt hóskandi lógarverk eigur at vera rundanum skráseting og brúki av grunddáta

## Niðurstøður viðvíkjandi KT-arkitekturi

- Samskiftið millum skipanir skal vera einsháttað og bygt á nýmótans standardum
- Samskiftið millum skipanir skal vera trygt
- Avmarkingar skulu ikki vera í, hvar skipanir skulu rekast
- Samskifti millum skipanir skal kunna fara fram umvegis internetið
- Skipaði viðurskifti. Ein almennur mynduleiki eigur at vera, sum heldur skil á samskifti millum skipanir – hvør hevur atgongd til hvat, og hvør samskiftir við hvønn
- Tað skal ikki vera neyðugt hjá stovnum at fara í samráðingar við aðrar stovnar ella veitarar, hvørja ferð tørvur er á at fáa fatur í upplýsingum hjá hvørjum øðrum
- Tað eigur at verða skrásett, tá skipanir samskifta, men ikki hvat verður samskift
- Tað eigur at vera møguligt hjá einum borgara at síggja, hvør ið hugt eftir upplýsingum um hann

Myndin niðanfyri lýsir Heldina sum ein tryggan part av internetinum. Einans góðkendir stovnar, kommunur og virkir kunnu knýta seg í Heldina, sum er ein miðspjødd, standardiserað loysn, ið ger tað lætt at samskifta millum skipanir, minkar um váðan við stórum, tætt samanknýttum skipanum, og minkar um óneyðugt dupultarbeiði.

Samansjóðing av grunddátaskráum gjøgnum Heldina:

- ger tað óneyðugt at lata somu upplýsing fleiri ferðir
- ger tað gjørligt at avgreiða síni viðurskifti á einum stað
- ger tað møguligt at síggja alt, sum er skrásett um teg
- kann geva tær innlit í, hvør hyggur eftir upplýsingum um teg

### Heldin heldur Talgildu Føroyar saman




# Myndugleiki og bygnaður

**Í heildarætlanini fyri talgilding eru átøk orðað, sum skulu verksetast næstu árini. Átøkini verða verksett í einari verkætlan, skipað til endamálið. Átøkini hava við sær nakrar rakstraruppgávur, sum skulu handast einum myndugleika so hvørt, sum átøkini eru verksett. Hesin myndugleiki fær ábyrgd av rakstri og menning av talgildingaruppgávum framyvir.**

**Verkætlanin,** sum fær til uppgávu at verkseta talgildingarátøkini, skal skipast eftir sama leisti, sum verkætlanin handan heildarætlanina fyri talgilding.

**Rakstrarbygnaðurin** verður skipaður undir verandi KT-eind hjá landinum, KT Landsins, sum frammanundan hevur førleikar, mannagongdir og royndir, sum tørvur er á, í menning og rakstri av framtíðar talgildingaruppgávunum.

### Rakstrarbygnaður

So hvørt talgildingin verður sett í verk, er neyðugt, at viðkomandi myndugleikar fáa ábyrgdina av at røkja tær uppgávur, sum talgildingin hevur við sær. Neyðugt verður við einum myndugleika, sum hevur yvirskipaðu ábyrgdina fyri talgildingini, so at tað verður ein felags kós fyri land, kommunur, vinnu og borgarar. Hesin myndugleikin skal hava ábyrgdina av at leggja ætlanir fyri talgilding, hava umsjón við, at KT lógir og trygdarkrøv verða hildin, gera leiðreglur og politikkir og standa fyri menning, rakstri og support av talgildingaruppgávunum.

Talan verður um at røkja og menna talgilda samleikan, Heldina og felags loysnirnar innan talgildar tænastur. Í teimum grannalondum, sum eru komin væl áleiðis á talgildingarleiðini, eru stovnar, sum hava myndugleika og ábyrgd av talgildingini. Í Føroyum finst eingin stovnur, sum hevur hesar uppgávur um hendi.

Lagt verður upp til, at KT Landsins, sum í dag røkir og mennir KT umhvørvið fyri umleið 60% av landsins stovnum, fær henda myndugleika. KT Landsins hevur frammanundan fleiri av teimum førleikum og royndum, sum eru neyðugar fyri at røkja hesar nýggju uppgávur.

Myndin niðan fyri er uppskot til ein framtíðar bygnað fyri KT Landsins, har nýggju uppgávurnar, sum standast av talgildingini, eru við.

## Myndugleiki og bygnaður



Tveir týðandi tættir í nýggja bygnaðinum eru talgildingarráðið og ráðgevandi toymini.

### Talgildingarráðið

Fyri at tryggja, at allir týðandi áhugabólkar stuðla og eru við í menningini av talgildingini, verður eitt ráð, mannað við fólki frá lands- og kommunumyndugleikum, sett á stovn. Ráðið fær til uppgávu at viðgera og taka støðu til strategiskar spurningar viðvíkjandi talgildingini. Ráðið fær tilmæli til viðgerðar og støðutakan sum stápsfunktiónin ‘ Menning’ orðar. Ráðið kann eisini sjálvt bíleggja viðgerð av strategiskum evnum.

### Ráðgevandi toymið

Fyri at tryggja, at allir viðkomandi áhugabólkar stuðla og eru við í menningini av einstøku tænastunum, verður eitt ráðgevandi toymi fyri hvørja tænastufunktión, mannað við fólki við tøkniligum førleikum frá viðkomandi áhugapørtum, sett á stovn. Dømi um møguligar áhugabólkar fyri t.d. samleika eru bankar, telefeløg, tøkniligir serfrøðingar, umboð frá viðkomandi stovnum og kommunum og herumframt aðrir serfrøðingar eftir tørvi, sum t.d. løgfrøðingar.

Toymið fær til uppgávu at tryggja góðsku og munadygd (effektivisering). Tað verður gjørt við at viðgera rakstrar- og menningarspurningar, koma við tilmælum um broytingar og virka sum ráðgevar fyri tænastufunktiónina.

# Talgildu Føroyar fyri øll

Tøknin skal geva øllum atgongd til okkara talgilda samfelag. Talgildingin skal gera tað lættari hjá teimum við skerdum førleika, teimum, sum eru stødd á útoyggj, til skips ella uttanlands at brúka almennu tænasturnar og aðrar tænastur í felags kervinum.

At kunna avgreiða síni viðurskifti á netinum er fyri flestu borgarar ein betri tænasta og ein lætti í gerandisdegnum. Tá kann borgarin avgreiða heima, til skips, á sjúkrahúsi ella í øðrum londum, heldur enn at standa í bíðirøð á kommunuskrivstovuni ella hjá almannaverkinum.

Hjá summum borgarum er talgildingin ein avbjóðing; kanska duga tey ikki nóg væl KT, ella tey bera brek, sum forðar teimum at brúka tænasturnar. Hesir borgararnir skulu eisini fáa góða tænastu og ta hjálp og tann stuðul, sum eru neyðug.

Nakrir av stóru bólkunum, sum bera brek, eru tey, ið:

- ikki síggja nóg væl ella eru blind
- eru lesiveik
- ikki hoyra nóg væl ella eru deyv
- eru rørslutarnað
- ikki hava lætt við at fata

Altjóða standardir eru fyri, hvussu heimasíður og sjálvgreiðslur skulu vera skipaðar, soleiðis at mest sum allir borgarar kunnu fáa gagn av teimum. Nógv ymisk hjálparamboð eru eisini. Alneyðugt er at seta portalin upp soleiðis, at hjálparamboð eru tøk beinanvegin og klár at brúka frá fyrsta degi.

Fyri tey, sum eru sjónveik, má bera til at vaksa um partar av myndini á skíggjanum, og tað má eisini bera til at fáa tekstin upplisnan. At teksturin verður lisin upp, hjálpir eisini teimum, sum eru lesiveik og orðblind. Ein partur av fólkinum er eisini litblindur. Fyri tey er tað ein hjálp, um litirnir kunnu verða broyttir til at vera í svørt-hvítum, ella um teir kunnu gerast sterkari, so munurin verður størri.

Tann, sum er deyvur, má kunna lesa alt, sum er á portalinum. Eru t.d. filmsbrot, skulu hesi vera tekstað, soleiðis at deyv skulu fáa kunningina.

Eru fólk rørslutarnað, soleiðis at tey ikki kunnu brúka amboð sum knappaborð og mús, eru onnur sergjørd amboð, sum kunnu verða brúkt.

Hjá tí, sum hevur tað trupult at fata og minnast tað, hann hevur lisið, er umráðandi, at bara tað mest neyðuga stendur á síðuni, og at orðingarnar eru stuttar og greiðar.

Í summum førum er besta hjálpin, at borgarin kann venda sær til stovnin ella tænastuveitaran við brævi ella koma á gátt á stovninum at fáa avgreitt síni viðurskifti.

Tey, sum ikki kenna seg trygg, tá ið talan er um KT, kunnu hjálpast á leið og við stuðli í telefon ella á tænastustaðnum avgreiða síni viðurskifti á teldum, sum eru settar upp til tað sama. Kanska hava tey dirvi næstu ferð at royna sjálv.

Skipanirnar mugu hava fyrilit fyri tilflytarum, sum ikki eru stinnir í føroyskum máli. Hjá teimum má bera til at fáa somu atgongd til tænasturnar á enskum. Hetta kann eisini hjálpa teimum at gerast partur av føroyska samfelagnum.

# Átøk og kostnaðarætlan 2016-2020

| Øki | Verkætlanir | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | Tilsaman |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1. Programskrivstova** | | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **12.250** |
| **2 Talgildar tænastar** | | **6.300** | **6.400** | **2.900** | **2.500** | **2.000** | **20.150** |
| 21 | Borgaraportalur | 5.500 | 6.000 | | | | 11.550 |
| 22 | Sjálvgreiðsla | 800 | 400 | 400 | | | 1.600 |
| 23 | Rakstur og viðlíkahald | | | 2.500 | 2.500 | 2.000 | 7.000 |
| **3 Talgildur samleiki** | | **7.100** | **11.000** | **21.000** | **4.200** | **4.200** | **48.150** |
| 31 | Útboð og stovnseting | 7.000 | 8.000 | 17.000 | 200 | 200 | 33.050 |
| 32 | Rakstur | 100 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 8.100 |
| 33 | Víðarimenning, víðlíkahald | | 1.000 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 7.000 |
| **4 KT Arkitekturur (Heldin)** | | **5000** | **6000** | **2000** | **2000** | **2000** | **17.350** |
| 41 | Menna og verkseta standardir | 5000 | 5000 | | | | 10.350 |
| 42 | Umsiting av heldini | | 1000 | 2000 | 2000 | 2000 | 7.000 |
| **5.1. Grunddata, Ognir** | | **3.450** | **7.250** | **7.250** | **5.000** | **1.000** | **24.300** |
| 511 | Lóg, myndugleiki og organisering | 200 | | | | | 550 |
| 512 | Talgilding av analogum tilfari | 1.350 | 1.350 | 1.350 | | | 4.050 |
| 513 | Datavask og góðskutryggja | 900 | 900 | 900 | | | 2.700 |
| 514 | Nýtt tinglýsingar- og matrikulskipan | 1.000 | 5.000 | 5.000 | 5.000 | 1.000 | 17.000 |
| 515 | Projektleiðsla á US | 600 | 600 | 600 | 600 | | 2.400 |
| **5.2 Grunddata, geodata** | | **1.250** | **1.000** | **1.000** | **1.000** | **1.000** | **5.350** |
| 521 | Lóg, prosess og arbeiðsgongdir | | | | | | 100 |
| 522 | Foto, matrikel, DTM, topografi kort, adressuskrá | 750 | 750 | 750 | 750 | 750 | 3.750 |
| 523 | kortal.fo og datasamskifti | 500 | 250 | 250 | 250 | 250 | 1.500 |
| 524 | Projektleiðsla á US | 100 | 100 | 100 | 100 | | 400 |
| **5.3 Grunddata, Persónar** | | **1.550** | **1.350** | **1.150** | **700** | **700** | **5.550** |
| 531 | Lógarbroytingar | 100 | | | | | 200 |
| 532 | Góðskutryggja data | 450 | 450 | 450 | | | 1.350 |
| 533 | Skráseting við føðing | 100 | | | | | 100 |
| 534 | IT-arkitektur og standardir | 300 | 300 | 100 | 100 | 100 | 900 |
| 535 | Fríðkeyp av data | 600 | 600 | 600 | 600 | 600 | 3.000 |
| 536 | Projektleiðsla á US | 200 | 200 | 200 | | | 600 |
| **5. 4 Grunddata, Virkiskrá** | | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **10.100** |
| | **Tilsaman** | **29.100** | **37.450** | **39.750** | **19.750** | **14.900** | **144.900** |

**Fylgiskjal 2**

**Kostnaðarætlan 2016-2020 býtt á verkætlanir t.kr.**

**Løga**

| Øki | Verkætlanir | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1. Programskrivstova** | | **1.000** | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **2.000** | **9.000** |
| **2 Portalar og tænastar** | | **0** | **1.450** | **5.100** | **7.400** | **13.800** | **27.750** |
| 21 | Borgaraportalur | | 1.450 | 2.400 | 1.400 | 900 | 6.150 |
| 22 | Sjálvgreiðslur | | | 2.700 | 6.000 | 12.900 | 21.600 |
| **3 Samleiki** | | **5.500** | **16.150** | **12.800** | **6.100** | **6.100** | **46.650** |
| **31** | Útboð og stovnseting | 5.500 | 8.000 | - | - | - | 13.500 |
| **32** | Menning | | 8.150 | 12.800 | 6.100 | 6.100 | 33.150 |
| **4 Heldin** | | **2.500** | **1.700** | **2.100** | **2.140** | **2.130** | **10.570** |
| **41** | Stovnseta | 2.500 | - | - | - | | 2.500 |
| **42** | Menning av markamótum | | 1.700 | 2.100 | 2.140 | 2.130 | 8.070 |
| **5.1. Grunddátur** | | **1.000** | **6.825** | **13.625** | **15.985** | **9.595** | **47.030** |
| **51** | Yvirskipaðar forkanningar | 1.000 | - | - | - | - | 1.000 |
| **52** | Ognir (tinglýsing, matrikkul) | | 2.100 | 8.000 | 9.500 | 4.600 | 24.200 |
| **53** | Geodátur (kort) | | 1.500 | 1.100 | 1.100 | 1.100 | 4.800 |
| **54** | Fólkayvirlit | | 1.625 | 1.600 | 2.300 | 1.400 | 6.925 |
| **55** | Virkisskrá | | 1.600 | 2.925 | 3.085 | 2.495 | 10.105 |
| **Íalt** | | **10.000** | **28.125** | **35.625** | **33.625** | **33.625** | **141.000** |

**Verkætlanarrakstur**

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Portalar og tænastur** | | - | - | - | 500 | 500 | 1.000 |
| **Samleikin** | | - | - | 1.000 | 2.500 | 2.500 | 6.000 |
| **Heldin** | | - | 500 | 500 | 500 | 500 | 2.000 |
| **Íalt** | | **0** | **500** | **1.500** | **3.500** | **3.500** | **9.000** |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Talgildu Føroyar íalt** | | **10.000** | **28.625** | **37.125** | **37.125** | **37.125** | **150.000** |

# Fylgiskjal 3

Upprit um nyttu gjørt av Morten Meyerhof,  serfrøðingi í e-governance/talgilding

## Digitaliseringsstrategi 2016-2020:
## Mulige gevinster og gevinstrealiserings-modeller

## Problem

I de kommende år forstærkes de demografiske og økonomiske udfordringer på Færøerne. Øget brug af IT og teknologi kan bidrage til en løsning. Estland har estimeret at en årligbesparelse på op til 2% af BNP ved introduktion af digitalt ID og underskrift, Danmark forventer at spare op til kr. 3 milliarder årligt ved at afskaffe papirformularer og papirpost. EU beregninger viser at genbrug af grunddata kan skabe op til 2% BNP vækst, mens afbureaukratisering i Holland har ført til en samfundsøkonomisk gevinst svarende til 0,9% af BNP. Udfordringen er at estimere de færøske gevinster og hvordan de høstes.

## Løsning

Regelforenkling, afbureaukratisering og digitaliseringer kan frigive offentlige ressourcer, til at løfte den øgede ældrebyrde og skabe de rigtige uddannelses- og erhvervsfremmede rammer.

En digital identitet og digital signatur udvikles og driftes centralt, så er det de enkelte myndigheder og virksomheders opgave at sikre, at den giver adgang til deres digitale tjenester for skatteindbetalinger, flyttemeddelelser, patientjournaler, netbank osv. – og at disse er tilgængelige på en fremtidig national borger- og virksomhedsportal. Ligeledes er det op til de ansvarlige myndigheder at optimere brugen af IT og teknologi for deres egne fagområder, ved at benytte de grunddata principper, standarder og den fysiske IT-arkitektur der skabes gennem digitaliseringsstrategien, fx ved øget automatisering af interne processer, genbruge autoriseret grunddata og afskaffe dobbeltregistrering.

### Mulige gevinster

1. **Digital identitet, underskrift og fuldmagt (eID)**
   Én sikker og personlig nøgle og elektronisk identifikation for alle borgere og virksomheder, som kan bruges af alle udbydere, offentlige såvel som private, af digitale services.

   Estland har estimeret at en årligbesparelse på op til 2% af BNP ved introduktion af digitalt ID og underskrift. En konservative oversættelse til færøske forhold på en årlig besparelse på 1% af BNP vil betyde en samfundsøkonomisk gevinst på kr. 145 millioner årligt. En ultra konservative præcisering vil være en udregningsmodel er baseret på antallet af kontrakter signeret digitalt årligt i det offentlige. En neutral business case for digital signature, over 5 år, vil i dette tilfælde være et estimat hvor hver enkel færing årligt bruger 10 min. på at underskriver og sende et dokument og at 50% af disse underskrives og sendes digitalt. Et sådanne estimat vil spare det offentlige for kr. 4,5 millioner årligt. De 21% vil være i form af sparet arbejdskraft, 71% i form af udgifter til dokument udskrivning plus 8% på postfrankering (se bilag 1, note 1).

2. **Portal og eService**
   For at øge kvaliteten af offentlige yderser og højne effektiviteten i det offentlige, vil digitale løsninger (eServices) gradvist blive introduceret, og de dyre og tidskrævende papirformularer og breve vil blive

udfaset. Løsninger skal være intuitive, brugervenlige, personlige og øge værdi for den enkelte bruger og virksomhed. De digitale services vil gøre det muligt, at forenkle og øge automatiseringen af sagsbehandlingen.

Danmark forventer at spare op til kr. 800 mio. årligt fra 2016 ved at afskaffe papirformularer og næste kr. 2 mia. på digitaliseringen af papirpost. De danske estimater er baseret på forskellige kanalpriser i det offentlige. Beregnet på tværs af 35 serviceområder for en gennemsnitlig kommune varierer myndighedsudgiften for at leverer en ydelse via personligt fremmøde, post elleren papirblanket 2-3,5 gange så dyr som en digital selvbetjening med en stor grad of automatisering i sagsbehandlingen (se figure 1).




*Figur 1: Kanalpriser og henvendelsesmønster i danske kommuner (2010)*

Forudsat af alle adresseændringer i Færøerne i dag er per post eller papirblanket, estimeres den årlige besparelse vedfuldautomatisering og digitaliseringsgrad på 50% af volumen at være på kr. 162.000, mens en lignende beregning for digitaliseringen af ansøgningen for rejsetilskud vil være på kr. 55.500 (se bilag 1, note 2).

For en videreudvikling og øget brug af digital post vil besparelsesmønsteret for håndterings, produktions og frankeringsudgifter på linje med digitalt signerede kontrakter.

3. **Grunddata**

For at minimere de økonomiske udgifter i det offentlige, vil et ”once only” princip blive introduceret for de mest benyttede datasæt i det offentlige (fx adresser, personer og virksomhedsoplysninger og indkomst oplysninger). Det betyder at myndigheder ikke må bede borgere og virksomheder om oplysninger andre myndigheder allerede ligger inde med. Det betyder også at myndigheder kan reducere fejl i sagsbehandlingen, da kun en autoriseret datakilde eksisterer.

Ved at frikøbe data betales der ikke for vedligehold af parallelle systemer, datasæt og arbejdsgange. På længere sigt bør ikke personhenførbare data kunne genbruges af private aktører til udviklingen af nye løsninger og ydelser.

